## VIÐMERKINGAR

# Leikirnir aftanfyri tjaldið

JÓGVAN PÁLL SEVDAL



Heini, Jógvan Elias, Randi, Jógvan Páll, Fríðgerð, Poul Andrias, Bjarni, Filip og mong onnur hava skrivað um hetta nú ólukkuliga Leirviks "syndromið" ella ta "genialu loysnina".

Hin "**geniala loysnin**" er og verður hin besta fyri allan framburð í Leirvík. Grundstykkir verða tøk. Trygdin fyri ungu familjurnar við børnum verður hin besta. Trivnaðurin verður í hásæti, og vit, sum eru komin upp í árini kunnu við gleði lata okkara komandi ættarliði teir allarbestu búleikar- og trivnaðar møguleikar.

**Feigdarleikurin**
Hvussu er nú allur hesin feigdarleikur byrjaður? Havi mangan hugsað um teir mongu leikir, sum liggja aftan fyri tær ymisku framløgur og frásagnir. Tað løgna við teimum er, at tær kunnu ikki í fyrstu syftu prógvførast.

**Illgrunin**
Sum málið viðvíkjandi vegaføringini hevur tikið seg upp, liggur nær at hugsa, at nógvir leikir eru spældir aftan fyri tjaldið, og at ætlaði ruðuleikin júst hevur verið endamálið fyri at náa ávísum málið.

**Løgtings lóg nr. 49 frá 10.04. 2003**
Sigur greitt, at tunnil til vegaføring er samtykt við lóg fyri tær uml. 75 mió.

**Harra Bjarni Djurholm:**
Hvar byrjar leikurin aftanvert leiktjaldið. Jú, "eingin vil kennast við lógarbundnu samtykt" altso tunnilin omanvert bygdina, sigur landsstýrismaðurin – nú er dysturin byrjaður. Hvar koma so omanfyri nevndu neiligu orðini inn.

**Harra landsstýris maður**
**HVÍ** vilt tú ikki siga **hví** táverandi bygdarráð og núverandi, við nevndu fortreytum ikki vildi kennast við lógarfestu tunnilsgerð omanfyri bygdina. Jú, tí longu tá var leikurin spældur kanska fleiri?

**Leirvíkar Bygdarráð**
Á fundi, hin 3. juni 2003 millum Landsverk og Leirvíkar Bygdarráð, og tað er júst her, at gitingin, illgrunin kemur fram. **"Kommunan má tí ásanna at grundarlagið fyri støðutakanini er broytt"** **"Bygdarráðið kann als ikki góðtaka eina sovorðna loysn"** Harra Bjarni Djurholm, **HVÍ?**

**Harra Bjarni Djurholm**
Hvussu ber tað til, at tú sum landsstýrismaður persónliga ert so heitur fyri eini vegaloysn, tá tunnilin omanvert bygdina er lógarbundin. Ert tú ikki bundin, at fylgja landsins lógum og tí, sum løgtingið hevur samtykt og eisini tí peningaupphædd, sum tað inniber? Hví vilt tú fyri ein hvønn prís hava ein veg? Hvørjir leikir eru farnir fram aftan fyri tjaldið?

**Harra Landsstýrismaður**
Kann tað hugsast, at tú aftanvert leiktjaldið langt síðani hevur framt leikir fyri júst **ikki** at eftirlíka leirvikingum og einum samdum Bygdarráð viðvíkjandi einum tunnili?

**Harra Landstýrismaður**
Er tað ikki júst tað, sum allatíðina hevur verið ætlanin. At draga málið út og fáa "fíggingina", og kanningarnar sum almennan rumbul og fjølmiðla rumbul?

**Fíggjarkanningar**
Hvussu var tá Norðoyatunnilin varð samtyktur. Vórðu fíggjarviðurskiftini og neyvar kanningar gjørdar til eina 400-500 mió verkætlan. Nei, heldur einki alment rumbul og miðla rumbul.

Hví henda útgreinaða kanningin um vegaføringina í Leirvík (tað er heilt upp á sítt pláss við neyvum kanningum) men motivið ella taktikkurin kann vera nakað heilt annað, ikki so?

**Nýggi Smyril**
Av øllum hjarta mínum ynskti eg suðuroyingum nýggja stásiliga farið.

Varð ikki játta nýggja Smyrli 65 mió eftir bert einari viku: Hví varð ikki tá ein kanning sett í verk? Hví varð ikki biðið um eykafígging til kanningar? Tá var einki alment rumbul, eingir miðlar á gosi.

Hví so nógv annarleiðis tá tað geldur Leirvík?

**Harra Bjarni Djurholm**
Ikki er tankin fjarur, at gita. Hví Landsverk og landsstýrismaðurin ikki nágreiniliga hava lagt fram tilmæli samsvarandi lógarbundnu samtykt, og ongantíð hava nevnt orsøkina **hví** Leirvíkar bygdarráð ikki kundu góðtaka fortreytirnar. Tað liggur heilt nær at gita og illgita!

**Størsta vónbrotið**
Óivað er tað ikki bert Landsstýrismaðurin einsamallur, sum telvar aftan fyri tjaldið.

Tað, sum ikki er hent í føroyskari politiskari søgu fyrr, er, at egni tingmaður bygdarinnar hevur við hond og fót arbeitt ímóti áhugamáli bygdarfólksins. "Ein luksustrupulleiki" Veit ikki um háttvirdi tingmaður hevur haft hvíta ella svarta fólkið.

**Harra Bjarni Djurholm**
Sigur um uppskot sítt til lógarbroytingar í rúsdrekkalógini, at "loftmiðlarnir hava fullkomiliga **misskilt** tað...." Sigur eisini: "Hetta (lógaruppskotið) framgongur tíanverri ikki **nóg greitt** í lógaruppskotinum.........." Kunnu vit leirvíkingar hava álit á landsstýrismanninum. Man ikki mangt vera bæði **misskilt** og ó**greitt** hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi vegaføringini í Leirvík?

**Hin geniala loysnin**
Lokrennan, sum bygdarráðið hevur samtykt, er og verður tann besta. Hon er loysnin nógv áratíggjur framyvir.

**Háttvirdu Eysturoyar tingmenn.**
**Tøkk eiga tit fyri stuðul tykkara á borgarafundinum í Leirvík. Vónandi svíkja tit ikki hin 4. apríl, men lata orð og praksis ganga hond í hond.**



Sen-Sen ferm